# Praktiskt ábyrgdarfólk til fiskaheilsu á sjónum

Sum praktiskt ábyrgdarfólk hjá okkum hevur tú eitt spennandi starv í eini livandi og framsøknari alifyritøku, har tú fert at virka sum bindilið millum alingina á sjónum og menningartoymið. Tú fert at fylgja við umstøðum og heilsuni hjá fiskinum á øllum alibrúkunum hjá Hiddenfjord. Dagliga samstarvar tú við alarar, aliformenn, fóðurleiðaran og menningartoymið.




## Arbeiðsøki og uppgávur

Í høvuðsheitum er talan um at skipa og at vera ein virkin partur í hesum uppgávum:

- At vera á alibrúkunum og ansa eftir fóðringini av rognkelsum og laksi
- At ansa eftir at umstøðurnar hjá rognkelsum á alibrúkunum eru í lagi
- At fremja heilsukanningar av laksi og rognkelsum
- At vera partur av ymiskum verkætlanum og menningararbeiði
- Annað fyrifallandi arbeiði

## Vit vænta, at tú hevur

- góð evni til at skipa dagliga arbeiðið og at loysa praktiskar arbeiðsuppgávur
- áhuga fyri røkt og trivnaði hjá fiski

Førleikar við aling og sjómansskapi eru fyrimunir. Sum praktiskt ábyrgdarfólk vísir tú til lívfrøðiliga mennaran. Arbeiðið er fyri tað mesta í vanligari arbeiðstíð, men tað kemur fyri, at uppgávur liggja uttanfyri vanliga arbeiðstíð, og tí vænta vit, at tú ert fleksibul hesum viðvíkjandi. Eisini er umráðandi, at tú tolir møguligar broytingar í arbeiðsinnihaldinum.

## Løn og setanarviðurskifti

Løn og setanarviðurskifti verða sambært avtalu.

## Umsókn

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Esbern Patursson, lívfrøðiligan mennara, á telefon 229097, ella til Marjuna Wilhelm, alileiðara, á telefon 288988.

Umsókn við CV, prógvum, viðmælum og øðrum viðkomandi skal sendast til starv@hiddenfjord.com.

Umsóknarfreistin er 16. mai 2022.

## Um Hiddenfjord

*Hiddenfjord er ein føroysk familjufyritøka, sum alir laks í Føroyum. Felagið hevur verið í stórari menning í mong ár og hevur í løtuni umleið 220 starvsfólk. Fyritøkan hevur smoltstøð, aling, góðskingarvirki og søludeild. Hiddenfjord leggur stóran dent á at ala í samljóði við náttúruna, so framtíðar møguleikar ikki verða darvaðir av nútíðar virksemi.*